# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 23. oktober 2009



Vinnarin av mansdystinum á Skála leggur seg einsamallan á odda, tá fyrsti fjórðingurin av hondbóltskappingini er farin aftur um bak

### Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 25.10 | 14.30 | VÍF-VB |
| 25.10 | 14.30 | StÍF-Neistin |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 25.10 | 16.00 | VÍF-H71 |
| 25.10 | 16.00 | StÍF-Neistin |
| 25.10 | 16.00 | Kyndil-KÍF |

**Flogbóltur**
**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 25.10 | 14.00 | SÍ-Mjølnir |
| 25.10 | 14.30 | TB-Fleyr |
| 25.10 | 17.00 | Dráttur-ÍF |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 23.10 | 18.30 | Fleyr-ÍF |
| 25.10 | 16.00 | SÍ-Mjølnir |

# Toppdystur á Skála

**StÍF og Neistin hava verið sterkastu liðini í manskappingini higartil. Sunnudagin hittast tey í Ítróttarhøllini á Skála. Og hjá kvinnum verður botnuppgerð í Vestmanna**





Jákup Mørk

Hondbóltskappingin er um at runda fyrsta fjórðingin av kappingarárinum, og bæði hjá kvinnum og monnum standa toppdystir fyri framman. Hjá kvinnum verður hesin tó ikki spældur um vikuskiftið, tí dysturin millum Stjørnuna og Tjaldur verður spældur mitt í viku.

Men hjá monnum er lagt upp til brak, tá Neistin vitjar á Skála. Bæði Neistin og StÍF hava higartil vunnið seks av átta stigum, og ein møguligur vinnari á Skála kann leggja seg einsamallan á odda í deildini.

Í Vestmanna verður dystur millum tveir av næstu avbjóðarunum, tá VÍF tekur ímóti H71, meðan Kyndil so ruddiliga er stórfavorittur í Havn, tá teir taka móti VÍF.

### Botnuppgerð í Vestmanna

Hjá kvinnunum hava VB, VÍF og StÍF enn síni fyrstu stig tilgóðar, men í øllum førum eitt av hesum hevur stig eftir vikuskiftið.

VÍF skal nevnliga á heimavølli taka ímóti VB, og fyri báðar partar er her talan um sera týðandi uppgerð, har tilveran í bestu deildini so smátt er um at standa upp á spæl.

Eins og hjá monnum, so vitja kvinnurnar hjá Neistanum á Skála. StÍF hevur inn til nú tapt sínar dystir, og spurningurin er, um Neistin her kann royna at krøkja seg upp í hini bæði oddaliðini, ella um StÍF kann taka dystin upp við havnarkvinnurnar um bronsumerkini.

## Toppdystir í Sørvági

SÍ og Mjølnir hittast í Sørvági sunnudagin, og bæði hjá kvinnum og monnum er talan um toppdystir í Eikliguni. Hóast hetta ber er triðja umfar, ið nú verður spælt í Eikliguni hjá kvinnum og monnum, eru ársins fyrstu toppdystir longu á skránni, tá SÍ og Mjølnir møtast í Sørvági sunnudagin, bæði hjá kvinnum og monnum. Hjá kvinnunum spæla SÍ og Mjølnir sunnudagin klokkan 14, og tað er ein uppgerð millum tey bæði fremstu liðini. SÍ hevur tó spælt ein dyst meira enn Mjølnir, og er eisini tvey stig frammanfyri, men sunnudagin fæst ein ábending um, um hesi bæði skulu kappast heilt har frammi í vetur. Tveir aðrir kvinnudystir eru eisini sunnudagin. Klokkan 14.30 spæla TB og Fleyr í Trongisvági, og meðan Fleyr hevur tvey stig fyri tveir dystir, er hetta fyrsti dysturin hjá TB. Dráttur tekur klokkan 17 ímóti ÍF á Giljanesi. Hjá monnunum eru tveir dystir um vikuskiftið. Annar er í kvøld klokkan 18.30, tá Fleyr og ÍF møtast í Gundadalshøllini, og hin er sunnudagin klokkan 16 í Sørvági, har SÍ og Mjølnir spæla. Mansdysturin í Sørvági er eisini toppdystur, tí Mjølnir og SÍ hava fingið eina frálíka byrjan upp á kappingarárið. Liðini hava vunnið báðar sínar fyrstu dystir, so vinnarin sunnudagin verður oddalið, tvey stig framman fyri nummar tvey.

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 98 | 56 | 42 | 6 |
| 2 Tjaldur | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 106 | 70 | 36 | 6 |
| 3 Neistin | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 77 | 77 | 0 | 4 |
| 4 VB | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 42 | 59 | -17 | 0 |
| 5 StÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 45 | 65 | -20 | 0 |
| 6 VÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 108 | -41 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 116 | 102 | 14 | 6 |
| 2 Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 125 | 113 | 12 | 6 |
| 3 VÍF | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 122 | 114 | 8 | 4 |
| 4 H71 | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 103 | 95 | 8 | 4 |
| 5 Kyndil | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 110 | 114 | -4 | 4 |
| 6 KÍF | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 87 | 125 | -38 | 0 |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| 2 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 3 Dráttur | 2 | 1 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 2 |
| 4 Fleyr | 2 | 1 | - | 1 | 3 | 5 | -2 | 2 |
| 5 TB | 0 | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 KÍF | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 7 ÍF | 2 | 0 | - | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Eik-ligan, kmenn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 4 |
| 2 SÍ | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 2 |
| 3 Fleyr | 2 | 0 | - | 2 | 3 | 6 | -3 | 0 |
| 4 ÍF | 2 | 0 | - | 2 | 0 | 6 | -6 | 0 |